**FÍGGJARGONGDIN 2012**

**Kunning um fíggjargongdina síðani ársaðalfundin sambært viðtøkunum §3, stk. 13 b og §4, stk. 12 b**

**RAKSTRAR-, FÍGGJAR- OG ÍLØGUÆTLAN 2013**

**Uppskot til fíggjarætlan fyri komandi rakstrarár til góðkenningar sambært viðtøkunum § 3, stk. 13 c og §4, stk. 12 c og §9, stk. 1 til stk. 4**

## 1. Inngangur

Felagið hevur seinastu 5 árini havt eitt samanlagt hall upp á umleið 133,5 mió. kr., og ein slík rakstrargongd kann ikki halda áfram.

Fyri at felagið skal kunna verða ført fyri at útvega fígging frá lánveitarum til íløgurnar, sum standa fyri framman og samstundis halda eitt nøktandi gjaldføri, er neyðugt at felagið í 2013 í minsta lagi fær javnvág í raksturin. Hereftir at hava eitt nøktandi rakstrarúrslit í 2014 og fram.

Felagið hækkaði elprísin 1. januar 2011 við 0,15 kr. pr. kWt og aftur 1. januar 2012 við 0,10 kr. pr. kWt við góðkenning frá Elveitingareftirlitinum. Samstundis ásannaði Elveitingareftirlitið saman við SEV, at við høga oljuprísinum og við atliti at tørvinum um at útbyggja og endurnýggja bæði á linjuøkinum og í framleiðsluni verður neyðugt við príshækkingum eisini í 2013.

SEV hevur upprunalig ætlað við príshækkingum uppá 0,05 kr. pr. kWt fyri allar brúkarar umframt eina príshækking uppá 0,11 kr. pr. kWt fyri ídnaðarkundarnar, soleiðis at teirra kWt prísur hækkar 0,16 kr. pr. kWt. Hetta framgekk av tilfarinum, sum bleiv sent eigarunum tann 16. november 2012.

Elveitingareftirlitið hevur fingið umsókn um ætlaðu príshækkingarnar hjá SEV, men hevur bert partvíst gingið umsókini á møti. SEV hevur fingið loyvi til at hækka prísirnar í 2013 við 0,05 kr. pr. kWt fyri allar brúkarar umframt 0,06 kr.pr. kWt fyri ídnaðarkundarnar í 2013 og 0,05 kr. pr. kWt í 2014. Munurin millum ætlanina hjá SEV og tað sum Elveitingareftirlitið vil góðkenna er ein hækking í prísinum uppá 0,05 kr. pr. kWt, í 2013, sum verður flutt fram til 2014.

Ætlað verður við javnvág á rakstrinum fyri 2013 og einum nøktandi yvirskot í 2014.

Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlanin fyri 2013 leggur upp til eina javning av kostnaðinum hjá SEV millum brúkararnar við at fremja broytingar í háttinum fyri prísáseting í mun til áður. Herumframt er í ætlanini roknað við hækkandi elnýtslu, eins og ætlanin í stóran mun er merkt av høgum kostnaði fyri olju til framleiðslu av elorku, stórum kostnaði av viðlíkahaldsarbeiðum og hækkandi avskrivingum og rentuútreiðslum.

Niðanfyri er greitt frá fortreytum og viðurskiftum. Dentur er lagdur á teir einstøku inntøku- og útreiðslubólkarnar, herundir príshækkingin upp á 0,05 kr. pr. kWt fyri allar brúkarar, uttan teir sum koma undir serstøku gjaldsskránna, og sum hava eina nýtslu størri enn 20.000 kWt. Hesir brúkarar fáa eina hækking upp á 0,11 kr. pr. kWt í 2013 og 0,05 kr. pr. kWt í 2014.

SEV metir støðuna við met høgum oljuprísum, at vera rættiliga álvarsama, og ynskir felagið alla tíðina at arbeiða fyri at seta tiltøk í verk sum minka um oljuútreiðslurnar. Í hesum

sambandi er SEV, við notati dagfest 7. november 2011 og umsókn frá 15. juni 2012, komið við uppskoti um eina royndarverkætlan við eini vindmyllulund í Suðurstreymoy, sum hvør einstakur elbrúkari, og harvið eisini alt samfelagið, fær ágóða av. Bæði hvat elprísum og umhvørvinum viðvíkur.

Jarðfeingi hevur í hesum sambandi alment bjóða áhugaðum at senda inn umsókn um loyvi til elframleiðslu úr vindorku. Umsóknarfreistin varð í fyrstu syftu sett til 15. oktober 2012, men hendan er longd til 17. desember 2012. SEV fer í hesum sambandi at lata inn umsókn.

Í fíggjarætlanini fyri 2013 er vindmyllulundin innroknað. Mett verður, at hendan kann fara í framleiðslu umleið miðjan 2013 tó ikki við fullari megi. Avbjóðingarnar eru stórar við einum so stórum parti av elframleiðsluni burtur úr vindmegi, tí verður neyðugt at útbyggja við stabilisering fyri at kunna taka ímóti øllum hesum vindinum. SEV metir, at arbeiðið við at útbyggja stabilisseringspartin fer at taka upp til 2 ár. Hereftir er SEV ført fyri at taka ímóti øllum tí vindi, ein slík vindmyllulund kann framleiða.

Við verkætlanini kann oljuinnflutningurin hjá SEV minka við nærum einum triðingi svarandi til 10.000 tons, og fer tað í síðsta enda at endurspeglast í einum bíligari elprísi ella tálmandi príshækkingum mótvegis kundunum og eini munandi minking í $CO_2$ útlátinum upp á umleið 33.000 tons árliga.

Somuleiðis eru nýggju myllurnar hjá SEV í Neshaga um at koma í rakstur, og fer hendan íløgan eisini at minka um oljunýtsluna hjá felagnum við umleið 2.150 tonsum av tungolju. Triðja vatnturbinan á Eiðisverkinum bleiv tikin í nýtslu í summar, men ikki fyrr enn fyrst í 2014 fer felagið at fáa ágóðan av størri vatnmongd frá Eiði 2 tunlinum, sum so aftur gevur eina minni nýtslu av tungolju upp á umleið 3.000 tons.

Við hesum trimum tiltøkum hevur SEV gjørt, at oljunýtslan hjá felagnum fellur við umleið 15.000 tonsum við verandi elnýtslu, ella 66 GWt verða framleiddir burturúr vindi og vatni. Hesir 66 GWt kunnu sundurgreinast soleiðis: 10 GWt frá nýggju vindmyllunum í Neshaga, 42 GWt frá vindmyllulundini í Suðurstreymoy og 14 GWt frá vatnorkuverkinum á Eiði.

Frá síðu 28 og fram til síðu 42 eru vístar ymiskar roknskaparligar uppstillingar, eins og nágreiniligar sundurgreiningar eru gjørdar fyri tey ymisku økini.

**Eykaaðalfundurin hjá SEV tann 30. november 2012 skal taka støðu til niðanfyri fyri 2013:**

- Fíggjargongdina síðani ársaðalfundin og gongdina fyri árið 2012, jvf. viðtøkunum § 3, stk. 13b og § 4, stk 12 b.

- Rakstrar- fíggjar- og íløguætlanina 2013, jvf. viðtøkunum § 3, stk 13 c og § 4, stk. 12 c og §9, stk. 1 til stk. 4, herundir:

    1. Príshækking upp á 0,05 kr. pr. kWt fyri allar brúkarar, uttan teir sum koma undir serstøku gjaldsskránna, og sum hava eina nýtslu størri enn 20.000 kWt. Hesir brúkarar fáa eina hækking upp á 0,11 kr. pr. kWt. Í 2013 og 0,05 kr. pr. kWt í 2014.

    2. Dagføring av gjaldsskránni samsvarandi príshækkingum og nýggjum kostnaði fyri íbindingargjøld. Hesi hækka frá 2.500 – 5.000 kr. pr. íbinding uppí 9.800 kr. til 13.030 kr. pr. íbinding. Somuleiðis hækkar kostnaðurin fyri hvør amper úr 200 kr. pr. amper uppí 1.185 kr.pr. amper.

    3. Samlaðar íløgur upp á 280,0 mió. kr. herundir vindmyllulund við stabiliseringsskipan og stabiliseringsskipan á netinum til at taka ímóti elframleiðsluni frá vindmyllulundini fyri upp til 150 mió. kr. Ein partur av íløguni upp á vindmyllulundina og stabiliseringsskipanina upp á 24 mió. kr. er settur at koma fyri í 2014.

    4. Samlað lántøka upp á 175 mió. kr.

## 2. Fíggjargongdin síðani ársaðalfundin og gongdin fyri árið 2012

Eftir viðtøkunum §3, stk. 13 b og §4, stk. 12 b hjá SEV skal nevndin lata eykaðalafundinum á heysti eina frágreiðing um búskapargongdina síðani seinasta ársaðalfund. Umframt gongdina síðani ársaðalfundin er niðanfyri greitt frá gongdini alt árið, soleiðis at givið verður eitt framroknað boð upp á úrslitið við árslok 2012.

Niðanfyri eru víst rakstrartøl sambært bókhaldinum fyri tíðarskeiðið januar til september 2012, og hvussu nógv prosent av ársfíggjarætlanini eru brúkt við endan av september. Bókingarnar eru tíðargreinaðar men ikki grannskoðaðar. Harafturat skal í tølunum fyri inntøkur takast fyrivarni fyri ársuppgerð av elkundum sambært avlestrum, sum verða gjørdir í desember, og sum umfata umleið tveir triðingar av elnýtsluni. Eisini skal roknast við møguligum eftirbókingum.

Niðanfyri standandi talva vísir rakstrartøl 2011 til 2012 í mió. kr.

| Navn | Roknskapur 2011 | Ætlan 2012 | Bókað pr. 30. sept. 2012 | Í % av ætlan pr. 30. sept. 2012 | Framroknað úrslit 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettoumsetningur | 316,4 | 334,6 | 283,6 | 84,6 | 356,8 |
| Oljuútreiðslur | 142,6 | 133,9 | 119,4 | 88,8 | 167,3 |
| Tilfar | 90,3 | 60,9 | 42,1 | 69,2 | 52,9 |
| Lønir | 62,6 | 65,6 | 44,1 | 67,3 | 59,6 |
| Útreiðslur íalt | 295,5 | 260,4 | 205,6 | 78,8 | 279,8 |
| **Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar** | **20,9** | **74,3** | **78,0** | | **77,0** |
| Avskrivingar | 55,8 | 68,2 | 51,2 | 75,0 | 61,4 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **-34,9** | **6,1** | **26,8** | | **15,7** |
| Rentuútreiðslur netto | 14,5 | 22,3 | 13,9 | 62,4 | 20,2 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **-49,4** | **-16,3**[1] | **12,9** | | **-4,5** |

Ársúrslitið fyri 2012 verður framroknað til eitt hall upp á 4,5 mió. kr. í mun til ætlað 6,3 mió.kr. eftir sparitiltak hjá felagnum. Framroknað verður við eini hægri inntøku upp á 22,2 mió. kr. enn ætlað, meðan oljuútreiðslurnar eru 33,4 mió. kr. hægri enn ætlað.

Kostnaðurin fyri tilfar og tænastuveitingar og lønir verður framroknaður við eini minni samlaðari nýtslu enn ætlað upp á 14,0 mió. kr. Avskrivingarnar eru 6,8 mió. kr. lægri enn ætlað, eins og rentukostnaðurin er 2,1 mió. kr. lægri enn ætlað. Leggja vit positivu broytingarnar saman, er talan um eina meirinntøku og minni nýtslu upp á 45,1 mió. kr.

Fyri at kunna samanbera ætlanartølini, tí hesi eru áðrenn spariætlanin innroknað, skulu 10 mió. kr. í minni nýtslu dragast frá teimum 45,1 mió.kr. svarandi til eina minni nýtslu og hægri inntøku upp á 35,1 mió. kr. Hetta mótvegis hækkandi oljuprísunum upp á 33,4 mió. kr.

[1] Omanfyri standandi fíggjarætlanin, sum vísir eitt undirskot upp á 16,3 mió.kr., skal javnast við spari- og inntøkutiltakinum upp á 10 mió. kr., sum er samtykt á eykaaðalfundinum 19. desember 2011. Hetta viðførdi, at ætlaða hallið upp á tær 16,3 mió.kr. fyri 2012 minkar niður í 6,3 mió. kr. Nevnd og leiðsla hava tí gjøgnum 2012 arbeitt við at fremja ætlanina fyri at røkka málinum.

SEV

## 2.1 Spari- og inntøkuætlan 2012 upp á 10 mió. kr.

Sum nevnt omanfyri samtykti eykaaðalfundurin, at felagið skuldi finna sparingar og inntøkur fyri íalt 10 mió. kr. Sparitiltakið hjá nevndini bleiv víðkað við 5 mió. kr., soleiðis at samlaða spari- og inntøkuætlanin skuldi verða 10 mió. kr. fyri 2012. Niðanfyri standandi talva vísir avleiðingarnar av ítøkiligu átøkunum, sum eru framd.

| Átøk | Mió.kr. | Viðmerkingar |
|---|---|---|
| Nýggjar avtalur við veitarar hjá felagnum | 0,95 | |
| Tillaðing innan starvsfólkaøkið og lønarsáttmálar | 1,70 | |
| Umraðfesting av starvsfólkatilfeingi í ætlanini | 2,50 | |
| Søla av ognum hjá felagnum | 1,80 | 0,2 mió. kr. ikki endaliga avgreitt |
| Niðurskurður í útreiðslum/umraðfesting innan framleiðslu- og netvirksemið | 4,90 | Ítøkilig átøk, Botn, Strond, Vág, Fossá, Sund, Mykines og Nólsoy. |
| Íalt | 11,85 | |

Framroknaður rakstur fyri tilfar og tænastuveitingar vísir ein minni kostnað upp á 8 mió. kr. enn ætlað, og lønarútreiðslurnar vísa framroknað eina minni nýtslu upp á 6 mió. kr. enn ætlað, svarandi til at framroknaði kostnaðurin verður 14 mió. kr. minni enn ætlað. Hesin minni kostnaður er ein avleiðing av spariætlanini og ætlaðum tiltøkum, sum ikki eru ella ikki væntast framd í verki.

## 2.2 Elframleiðsla og nýtsla

Elframleiðslan máld í GWt fyri 2011 var 273,8 harav 166,8 GWt vórðu framleiddir av oljuriknu verkunum (60,9%), meðan 92,5 GWt vórðu framleiddir við vatnorku (33,8%) og 14,5 GWT við vindi (5,3%). Avroknað søla til kundar felagsins var 254,8 GWt.

Náttúran broytist frá ár til ár og við henni eisini framleiðslan úr vatni og vindi, sum verður ávirkað bæði upp og niður. Væl av regni og vindi hevur verið fyrst í árinum og fram til tíðliga í summar, har turkur og vindstilli valdaði.

Fyrst í januar í ár fórst tann fyrsta Vestas myllan í Neshaga og í mars onnur Vestas myllan. Hetta hevur ávirkað framleiðsluna av elmegi við vindi munandi, og framgongur hetta eisini av niðanfyri standandi talvu. Herumframt hevur Heygaverkið ikki havt fulla framleiðslu fyri ein part av 2012 grundað á viðlíkahaldsarbeiðið. Elframleiðslan kann sundurgreinast, sum niðanfyri standandi talva vísir í GWt.

| | Jan-okt. 2012 | Í prosent | Jan-okt. 2011 | Nov 2011 til okt. 2012 | Nov 2010 til okt. 2011 | Broyting í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vindur | 7,4 | 3,1 | 12,3 | 9,6 | 15,1 | -36,3 |
| Vatn | 79,3 | 33,2 | 73,5 | 98,5 | 87,1 | 13,0 |
| Termisk | 152,4 | 63,7 | 139,0 | 180,8 | 172,4 | 4,9 |
| Íalt | 239,1 | 100,0 | 224,8 | 288,9 | 274,7 | 5,2 |

Verður hugt eftir tølunum fyri tíðarskeiðið november 2011 til oktober 2012 framgongur, at framleiðslan er økt við 5,2%. Elframleiðslan við vatni og termiskari orku er farin fram, meðan elframleiðslan við vindi er farin munandi aftur. Orsøkin er sum nevnt áður, at tvær vindmyllur fórust í ódnarveðrinum seinasta vetur. Økta framleiðslan sæst eisini aftur í hækkandi inntøkunum, ið væntast av hesum í 2012.

## 2.3 Inntøkurnar 2012

Tað eru tríggir faktorar, ið ávirka høvuðsinntøkuna hjá SEV. Hesir tríggir faktorarnir eru elprísbroytingar, broytingar í elnýtsluni og forskjótingar í millum ymiskar kundaprísbólkar.

Í fleiri ár á rað er inntøkan vaksin næstan uttan undantak orsakað av vaksandi elnýtslu, men síðani 2009 og fram til og við 2011 hevur avroknaða elnýtslan so at siga staðið í stað. Men framleiðslutølini fyri fyrstu 9 mánaðirnar av 2012 benda á ein vøkstur í nýtsluni.

Ætlað er við eini framgongd í søluni fyri alt árið upp á 4,8% til kundarnar, eftir at nettap og eginnýtsla eru drigin frá framleiðsluni. Umleið tveir triðingar av søluni verða gjørdir upp við avlestri hjá kundum eina ferð um árið, og verður tá staðfest, hvat sølan til tann einstaka kundan hevur verið. Avlisið verður í november og desember á hvørjum ári.

Bókaða inntøkan upp á 283,6 mió. kr. fram til 30. september 2012 kann ikki beinleiðis umroknast til eina fulla ársinntøku, av tí at umleið tveir triðingar av bókaðu inntøkunum eru grundað á akontorokningar, sum verða endaliga uppgjørdar við avlestri um árslok, og at ávísir skeivleikar kunnu verða í tíðargreiningum av akontoratum og inntøkum annars, sum ikki lækka javnt mánað fyri mánað.

Við støði í framgongdini í nýtsluni av elmegi, uppgerðum higartil, bókaðum íbindargjøldum og framleiðslutølum verður mett, at inntøkurnar fara at økjast við 22,2 mió. kr. í mun til ætlanina fyri 2012, soleiðis at nettoumsetningurin fyri árið 2012 gerst 356,8 mió. kr í mun til fyrst ætlað 334,6 mió. kr.

## 2.4 Rakstrarútreiðslurnar

### 2.4.1 Oljukostnaður

Langt tann størsti parturin av útreiðslunum er kostnaðurin til olju. Hesin kostnaður er beinleiðis tengdur at prísbroytingum á heimsmarknaðinum, umframt elnýtslubroytingini og sveiggjunum í framleiðsluni av elmegi við vindi og vatni.

Oljuprísirnir, sum SEV skal gjalda, eru tengdir at prísnoteringini á oljumarknaðinum og USD-kursinum. Prísirnir hava verið sera óstøðugir higartil í 2012 serliga grundað á heimsstøðuna mótvegis Iran. Miðalprísurin fyri desember 2011 var 648,1 dollar pr. tons tungolju. Síðani hækkaði hann upp í 677,4 dollar pr. tons tungolju í januar 2012 og heilt upp í 753,6 dollar í miðal fyri mars 2012. Prísurin fall síðani til 590,3 dollar í miðal fyri juni mánað 2012 fyri síðani aftur at hækka munandi heilt upp í 702,5 dollar í miðal fyri september mánað 2012. Víst verður annars til myndina viðvíkjandi oljuprísinum undir broti 4 í frágreiðingini.

Higartil hevur SEV ikki hedgað kostnaðin fyri oljukeypið, men sum eina roynd hevur felagið í juni mánað hedgað helvtina av oljukeypinum fyri seinra hálvár 2012 til ein miðaloljuprís upp á 590 dollar pr. tons tungolju. Hetta er nakað undir ætlaða oljuprísinum í fíggjarætlanini fyri 2012, sum var upp á 625,7 dollar pr. tons tungolju[1]. Afturat hesum skal leggjast kostnaður til veitaran av oljuni.

Oljuútreiðslurnar til egnu nýtslu fyri 2012 eru ætlaðar at verða 134,5 mió. kr.[2] Fyri 2012 er roknað við einum prísi upp á 3.737 kr. pr. tons tungolju[2]. Soleiðis sum gongdin hevur verið í oljuprísinum, verður nú roknað við einum prísi upp á 4.343 kr. pr. tons tungolju[3]. Samlaði oljukostnaðurin netto fyri 2012 verður framroknaður til 167,3 mió. kr. í mun til ætlað netto 133,9 mió. kr., svarandi til ein meirkostnað upp á 33,4 mió. kr. Orsøkin til hækkanina er fyrst og fremst hækkaðu oljuprísirnir av samlaðu oljunýtsluna hjá felagnum, men eisini ein nakað størri framleiðsla við termiskari orku.

### 2.4.2 Tilfar og tænastuveitingar

Samlaði kostnaðurin fyri tilfar og tænastuveitingar varð ætlaður til 60,9 mió. kr., meðan hesin framroknað vísir seg at gerast 8,0 mió. kr. lægri ella 52,9 mió. kr. Hendan lægri nýtsla kann sundurgreinast soleiðis, at framleiðsluvirkini hava eina lægri nýtslu upp á 3,1 mió. kr., netvirksemið 1,2 mió.kr. og fyrisitingin 3,7 mió. kr. Talan er um arbeiði, sum er umraðfest

---

[1] Ikki íroknað Gassolju og smyrjuolju

[2] (133,9 mió.kr. netto eftir 0,6 mió. kr. í inntøku frá sølu til triðjamann eru frádrignar 134,5 mió. kr.)

[2] íroknað gassolju og smyrjuolju. Í 2013 verður sjálvstøðug ætlað við kostnaði fyri gassolju og smyrjiolju grundað á øktan kostnað á økinum.

[3] íroknað kostnaðin fyri gassolju og smyrjuolju.

ella útsett til 2013. Hartil kemur, at felagið skal spara pening í rakstrinum fyri 2012, og hevur tí hildið aftur við útreiðslunum.

Í januar 2012 varð ein ultrasonic kanning gjørd av øllum stempulstongunum á tveimum motorum á Sundsverkinum (M1 og M2). Niðurstøðan av hesi kanning varð, at SEV fekk tilmælt at skifta stengurnar, sum feilur er á. Hetta arbeiði verður mett at kosta umleið 3,5 mió. kr., sum verða at økja rakstrarútreiðslurnar við. Tilsvarandi upphædd er avsett í fíggjarætlanini fyri 2013. Arbeiðið skal gerast í sambandi við, at høvuðseftirlitið fer fram á motorunum. Hesi skulu gerast ávikavist í november 2012 og september 2013.

### 2.4.3 Lønir

Samlaði kostnaðurin fyri lønir varð ætlaður til 65,6 mió. kr., meðan framroknað verður kostnaðurin 59,6 mió. kr. svarandi til eina lækking á 6,0 mió. kr. Hendan lægri nýtsla kann sundurgreinast soleiðis, at framleiðsluvirkini hava eina lægri nýtslu upp á 0,1 mió. kr., netvirksemið 4,5 mió. kr. og fyrisitingin 1,4 mió. kr. Felagið hevur í 2012 tilpassað starvsfólkahópin nakað, eins og felagið ikki hevur økt um hendan, sum upprunaliga ætlað. Hetta er ein liður í spariætlanini hjá felagnum fyri 2012.

### 2.4.4 Avskrivingar av anleggum

Avskrivingarnar av anleggum eru ætlaðar til 68,2 mió. kr., men framroknað verða hesar 61,4 mió. kr., sum eru 6,8 mió. kr. lægri. Avskrivingarnar taka støði í verandi ognum eins og til- og frágongd av ognum í 2012. Orsøkin til lægru avskrivingarnar er, at felagið ikki hevur framt allar tær ætlaðu íløgurnar fyri 2012, eins og býtið av avskrivingunum millum árini broytast nakað, alt eftir nær ognirnar verða tiknar í nýtslu.

### 2.4.5 Renta

Ætlað varð við einum nettorentukostnaði upp á 22,3 mió. kr. Framroknað verður hesin 20,2 mió. kr. svarandi til ein lægri kostnað upp á 2,1 mió. kr. Felagið hevur framhaldandi virkað fyri at tingast við peningastovnarnar um rentukostnaðin, og hetta hevur ávirkð gongdina í kostnaðinum positiva vegin.

Núverandi langtíðarlánini hjá SEV hava fasta og broytiliga rentu. Lánið í sambandi við Eiði 2 verkætlanina hevur fasta rentu í byggitíðini, og skal rentan endaliga avtalast í 2013.

## 2.5 Íløgur, lántøka og gjaldføri

Sambært fíggjarætlanini fyri 2012 varð roknað við íløgum fyri í alt 180 mió. kr. Nú árið er farið at halla, kann staðfestast, at íløgurnar í árinum verða 130,5 mió. kr, sum eru minni enn ætlað við umleið 50 mió. kr.

Tær íløgur sum ikki verða framdar, eru í høvuðsheitum hesar. Íløgan í tunnilin í Eiði 2 verkætlanini verður 8 mió. kr. lægri, kontrollanlegg og bygningur til maskintransformara og anlegg á Heygaverkinum er útsett til 2013 svarandi til 10 mió. kr., dagføring av tangagarði og bunkerleiðing á Sundsverkinum er útsett til 2013 svarandi til 17,7 mió. kr., nýggj koblingsstøð í Vestmanna er útsett til 2014 svarandi til 13 mió. kr., transformarstøð í Havnadali er útsett svarandi til 2,0 mió. kr., keyp av KT-útbúnaði er lækkað við 5,5 mió. kr. Harafturat koma smærri ætlaðar íløgur, sum ikki verða framdar ella útsettar.

Omanfyri nevnt svarar til eina minni íløgu upp á tilsamans 56,2 mió. kr. Hinvegin eru gjørdar umraðfestingar millum annað í sambandi við keyp av vindmyllum fyri umleið 10 mió. kr. og fyri net og koblingsstøðir fyri 7 mió. kr. svarandi til 17 mió. kr. íalt.

Lántøkan í 2012 er 174 mió. kr. Hendan kann sundurgreinast í gjaldførislántøkuna upp á 80 mió. kr., sum bleiv játtað á eykaaðalfundinum 19. desember 2011 og 94 mió. kr. í vanligum íløgulánum.

Í fíggjarætlanini fyri 2012 varð ætlað við eini lántøku upp á 99 mió. kr. umframt 80 mió. kr. í gjaldførisláni um ársskiftið 2011/2012 ella í alt eini lántøku upp á 179 mió. kr.

Gjaldførislántøkan upp á 80 mió. kr. bleiv avgreidd í januar 2012. Herumframt hevur felagið fingið útgoldið seinastu raturnar upp á 38 mió. kr. í sambandi við Eiði 2 verkætlanina, eins og felagið hevur tikið 25 mió. kr. í láni til nýggju vindmyllurnar í Neshaga.

Herumframt hevur felagið fingið játtað lán upp á 31 mió. kr. til turbinu 3 á Eiðisverkinum svarandi til eina samlaða lántøku upp á 94 mió. kr. Hetta lán verður at avgreiða við endan av 2012. Við hesum hevur felagið fingið ætlaðu lántøkuna 2012 til vega.

Roknað verður við at hava eitt gott gjaldføri við ársendað upp á 93,0 mió. kr. Upprunaliga varð ætlað við einum tøkum peningi upp á 46 mió. kr., men økti tøki peningurin stavar frá, at íløgur fyri umleið 50 mió. kr. ikki verða framdar í 2012, sum ætlað. Umframt tøka peningin hevur felagið ein trekningsrætt upp á 30 mió. kr. í peningastovni. Tað økta gjaldførið verður at nýta til íløgur í 2013.

## 3. Fíggjarætlan 2013

Niðanfyri verður greitt frá, hvørji viðurskifti inntøkumetingarnar fyri ætlanina fyri 2013 byggja á.

Í fíggjarætlanini er ávirkanin av nýggju vindmyllulundini í Suðurstreymoy innroknað. Henda verkætlan hevur stóran týdning fyri raksturin hjá felagnum í árunum sum koma. Tað hevur eisini stóran týdning fyri fíggjarætlanina 2013, at verkætlanin kann takast í nýtslu medio árið, sum roknað við í fíggjarætlanini.

Vindmyllulundin er í 2013 ætlað at spara felagnum 12,7 mió. kr. í oljuútreiðslum, meðan avskrivingar og rentuútreiðslur verða 9,7 mió. kr., soleiðis at ætlaða úrslitið hjá felagnum í 2013 ávirkast 3,0 mió. kr. skeivan veg, svarandi til 1,7 mió. kr. í mun til 4,7 mió. kr. í yvirskoti, um tað onkursvegna ikki eydnast at taka vindmyllulundina í nýtslu medio 2013

Ávirkanin frá vindmyllulundini fer at økjast í 2014, har spardar oljuútreiðslur eru ætlaðar at verða 29,1 mió. kr., meðan avskrivingar og rentur útgera 11,7 mió. kr. Ávirkanin á ætlaða úrslitið fyri 2014 verður sostatt eitt fall í yvirskotinum frá 28,7 mió. kr. til 10,9 mió. kr., svarandi i 17,8 mió. kr. sum úrslitið gerst verri. Tá felagið hevur sett sær sum mál at hava nøktandi úrslit framyvir, er hetta ikki eitt úrslit, sum lýkur tær treytirnar.

Felagið metir sjálvt, at ætlanin er framsøkin, men hevur sett sær fyri, at hetta skal eydnast. Fortreytin er, at allir partar í málinum samstarva um at fáa verkætlanina at eydnast til ætlaðu tíðina .

### 3.1 Áseting av elprísinum

Felagið sendi eigarunum uppskot til rakstar-, fíggjar- og íløguætlan fyri 2012 tann 5. desember 2011 við uppskoti um at hækka elprísin við 0,25 kr. pr. kWt fyri 2012. Elveitingareftirlitið gav felagnum loyvi til at hækka prísin 0,15 kr. pr. kWt, tí sendi felagið eigarunum nýtt uppskot til rakstrar-, fíggjar- og íløguætlan fyri 2012 tann 18. desember 2011.

Eigararnir samtyku á aðalfundinum tann 19. desember 2011 at hækka elprísin við 0,10 kr. pr. kWt, og dagførdi felagið tí rakstrar-, fíggjar- og íløguætlanina fyri 2012 tann 19. desember 2011 í mun til ynskini hjá eigarunum. Herumframt bleiv felagið álagt at finna inntøkur og/ella sparingar fyri aðrar 5 mió. kr. soleiðis at samlaðu inntøkurnar og sparingarnar skuldi verða 10 mió. kr. fyri 2012.

Við hesum varð sambært rakstrar-, fíggjar- og íløguætlanini fyri 2012 roknað við einum halli upp á 6,3 mió. kr.

At felagið framhaldandi verður rikið við undirskoti, er ikki nøktandi í longdini, og verður tí neyðugt at fremja haldgóðar loysnir herundir áseting av einum nøktandi kWt prísi.

Tí hevur felagið gjørt nógv burtur úr at hyggja eftir prísskránni fyri at meta um, hvørt einstøku prísirnir eru teir røttu. Herumframt hevur felagið gjørt lønsemisútrokningar fyri kundabólkar og kundar, og úrslitið harav vísir greitt, at vinnulívskundarnir í bólkinum sum verður nevndur ídnaðarbólkurin, ikki eru prísaðir nøktandi.

Fyri at nevna eitt dømi so er kostnaðurin av hvørjum kWt framleiddur við olju 1,01 kr. pr. kWt í 2012, meðan kundarnir í hesum bólkinum rinda 0,99 kr. pr. kWt. (u/MVG) svarandi til, at felagið hevur eitt undirskot áðrenn annan kostnað upp á 0,02 kr. pr. kWt, sum aðrir kundar rinda fyri. Umframt oljukostnaðin hevur felagið eisini annan kostnað, sum er knýttur at, at framleiða hvønn kWt.

Tilsvarandi tøl fyri 2013 eftir príshækkingini eru ávíkavist 1,026 kr. pr. kWt og 1,10 pr. kWt, soleiðis at talan nú gerst um eitt yvirskot uppá 0,07 kr. fyri hvønn seldan kWt áðrenn annan kostnað. Miðal framleiðslukostnaðurin fyri hvønn kWt í 2012 verður mettur til 1,36 kr., meðan hvør kWt í miðal verður seldur fyri 1,34 kr. svarandi til at felagið hevur undirskot upp á 0,02 kr. fyri hvønn seldan kWt. Við príshækkanini í 2013 verður javnvág á rakstrinum, soleiðis at hvør kWt í miðal verður seldur fyri 1,41 kr. og samlaði kostnaðurin fyri sama kWt er 1,41 kr.

Samstundis hevur felagið síðani 2008 og fram til 2011 havt eitt samlað undirskot upp á 129 mió. kr., umframt at undirskotið fyri 2012 væntast at verða umleið 4,5 mió. kr., soleiðis at samlaða úrslitið fyri tey seinastu 5 árini er eitt undirskot upp á 133,5 mió. kr. Hesin peningur er latin elbrúkarunum.

Í 1992 varð semja gjørd við landsins myndugleikar um at avtaka oljugjaldið upp á tungoljuna, sum felagið brúkti. Oljuavgjaldið skuldi latast sum stuðul til felagsins útflutningskundar grundað á teirra elnýtslu. Avtøkan av oljuavgjaldinum svaraði til, at hvør kwt fyri nevnda kundabólk bleiv stuðlaður við 0,35 kr. Grundað á hetta hevur hesin kundabólkur ein kWt prís í 2012 svarandi til lægsta prís fyri hvønn kWt upp á 1,34 kr. minus stuðulin upp á 0,35 kr. svarandi til 0,99 kr. fyri hvønn kWt.

Síðani 1992 er kWt-nýtslan í kundabólkinum økt soleiðis, at umroknaði stuðulin upp á 0,35 kr. pr. kWt er ov høgur, og eigur at verða minkaður tilsvarandi øktu nýtsluni. Um hetta verður gjørt svarar hetta til eina lækking upp á 0,11 kr. pr. kWt, sum felagið hevur í hyggju at hækka kWt prísin við fyri ídnaðarkundarnar umframt eina minni hækking í kWt prísinum, sum allir kundar hjá felagnum verðar undirlagdir.

At felagið samlað hevur eitt undirskot upp á 133,5 mió. kr. seinastu 5 árini letur seg bert gera í eitt styttri tíðarskeið, og tí er neyðugt at ætlaða úrslitið fyri 2013 í minsata lagi verður í javnvág. Fyri at røkka hesum máli hevur felagið, umframt at meta um tørvin fyri at javna

prísin, gjøgnumgingið raksturin og gjørt metingar av útreiðslum og íløgum, sum eru ætlaðar komandi ár.

Tær útreiðslur og íløgur sum ætlað er við fyri 2013, metir felagið eru neyðugar at fremja fyri at hava eina trygga og góða elveiting. Fyri at røkka hesum máli, samstundis sum raksturin hjá felagnum skal hava yvirskot, er neyðugt at hækka elprísin eitt vet.

Tí ætlar felagið at hækka elprísin við 0,05 kr. fyri hvønn kWt fyri allar kundar felagsins, samstundis sum kundarnir í ídnaðarbólkinum umframt hækkingina upp á 0,05 kr. pr. kWt eisini fáa eina hækking svarandi til 0,11 kr. pr. kWt, soleiðis at prísurin fyri hvønn kWt hjá hesum bólki hækkar 0,16 kr. pr. kWt. Henda hækking í kWt prísinum verður fram yvir tvey ár. 0,06 kr. pr. kWt í 2013 og 0,05 kr. pr. kWt í 2014.

Henda hækking tryggjar felagnum eina javnvág í rakstrinum fyri 2013 og nøktandi yvirskot í 2014 sæð í mun til undirskotini seinastu árini. Frameftir verður tó neyðugt at hava eina skynsama renting av eginognini hjá felagnum. Hetta mál fer felagið at stremba eftir at røkka.

Hækkingin í elprísinum upp á 0,05 umframt 0,06 kr. fyri ídnaðarkundabólkin pr. kWt í 2013 viðførir, at gjaldsskráin pr. 1. januar 2013 verður sum niðanfyri standandi talva vísir.

| Árlig nýtsla í kWt | Fast gjald um árið í kr. | 2011 prísur í kr. uttan og við MVG | 2012 prísur í kr. uttan og við MVG | 2013 prísur í kr. uttan og við MVG |
|---|---|---|---|---|
| 0-10.000 | 480 | 1,36/1,70 | 1,46/1,83 | 1,51/1,89 |
| 10.000-100000 | 1.280 | 1,28/1,60 | 1,38/1,73 | 1,43/1,79 |
| >100.000 | 5.280 | 1,24/1,55 | 1,34/1,68 | 1,39/1,74 |

Serstøk gjaldsskrá er galdandi fyri ídnaðarvirkir, fiskaaling, landbúnað, fiskivinnu og ávísar edv-tænastur (nevndir ídnaðarbólkurin í frágreiðingini). Hendan er sum niðanfyri standandi víst.

| Árlig nýtsla í kWt | Fast gjald um árið | 2011 prísur í kr. uttan MVG | 2012 prísur í kr. uttan MVG | 2013 prísur í kr. uttan MVG |
|---|---|---|---|---|
| 0-10.000 | 480 | 1,36 | 1,46 | 1,51 |
| 10.000-20000 | 1.280 | 1,28 | 1,38 | 1,43 |
| > 20.000 | 9.080 | 0,89 | 0,99 | 1,10 |

Hækkingin í kWt prísinum við 0,06 kr. pr. kWt fyri kundarnar í ídnaðarbólkinum gevur felagnum eina meirinntøku uppá 5,3 mió. kr. í 2013 og 4,4 mió.kr í 2014 alt annað óbroytt, ella íalt 9,7 mió.kr.. Herumframt kemur hækkingin við 0,05 kr. pr. kWt fyri allar kundar felagsins (umframt tey 0,11 kr. pr. kWt fyri ídnaðarkundarnar). Henda hækking gevur felagnum 13,6 mió.kr í meirinntøku. Hækkingin í kWt nøgdini gevur bert felagnum eina meirinntøku uppá 5,4 mió. kr. grundað á øktar útreiðslur til olju til øktu framleiðsluna av elmegi.

Íbindingargjøldini hjá felagnum hækka eisini, alt eftir hvørji gjøld talan er um. Hetta er grundað á, at SEV ikki fær fulnað fyri kostnaðin, sum er tengdur at tænastuni við teimum gjøldum, sum eru galdandi ídag. SEV hevur í hesum sambandi lagt seg eftir at brúka sama framgangsshátt, sum verður brúktur av donskum elfeløgum við støði í "model til beregning af tilslutningsbidrag" gjørt av Dansk Energi.

Hetta viðførir, at Íbindindingargjøldini hækka frá 2500-5000 kr. upp í 9.800-13.030 kr. pr. Íbinding umframt at meirkostnaðurin fyri hvørt Amp. Hækkar frá 200 kr. til 1.185 kr.

Tað fasta gjaldið verður óbroytt.

Við eini hækking upp á 0,05 kr. pr. kWt svarar hetta til, at ein privatkundi við eini miðalnýtslu upp á 4.000 kWt skal rinda 21 kr. meiri um mánaðin íroknað MVG. Um talan er um ein privatkunda við eini miðalnýtslu upp á 6.000 kWt, skal hesin kundin rinda 31 kr. meiri um mánaðin íroknað MVG.

Er talan um ein miðal vinnukunda sum brúkar 12.000 kWt um árið, skal hesin rinda 50 kr. meiri um mánaðin. Er talan um ein ídnaðarkunda, sum brúkar 25.000 kWt um árið er talan um eina hækkin uppá 229 kr. pr. Mánað. Er til dømis talan um ein ídnaðarkunda, sum brúkar 230.000 kWt um árið fer hækkingin at merkja 25.300 kr. um árið ella 2.108 kr. um mánaðin.

## 3.2 Elnýtslan

Vøksturin í elnýtsluni hevur verið, sum niðanfyri standandi talva vísir.

| Ár | Avroknað elnýtsla til kundar í kWt í mió. | Vøkstur í kWt í mió. | Vøkstur í prosenti |
|---|---|---|---|
| 2007 | 256,8 | 15,2 | +6,3 |
| 2008 | 258,9 | 2,1 | +0,8 |
| 2009 | 252,0 | -6,9 | -2,7 |
| 2010 | 255,0 | 3,0 | +1,2 |
| 2011 | 254,8 | -0,2 | -0,1 |
| 2012 framroknað | 267,1 | 12,3 | +4,8 |
| 2013 meting fyri árið | 271,3 | 4,2 | +1,6 |

Omanfyri standandi talva vísir, at roknað verður við eini øking í elnýtsluni upp á 1,6% í miðal í 2013 í mun til 4,8% í 2012. Hendan øking stavar frá vøkstri í fleiri kundabólkum við ymiskum vakstrarratum.

Roknað verður við eini øking í nýtsluni orsakað av størri framleiðslu hjá vinnukundum. Privatkundar felagsins taka í nýtslu alt fleiri tól, sum brúka el eitt nú hitapumpur, fleiri flatskermar og teldur pr. brúkara. Hetta er eisini nakað, sum nýggja heildarætlanin á elorkuøkinum í Føroyum umrøður.

Sum talvan vísir, er roknað við vøkstri í elnýtsluni frá 2012 til 2013. Roknað er við eini framleiðslu upp á 290,2 fyri 2012 og 294,8 GWt fyri 2013. Framleiðslan frá varandi orkukeldum er mett at verða ávikavist 111,0 og 141,7 GWt fyri 2012 og 2013. Hendan stavar frá vatn- og vindorkuframleiðslu, har vatnorkan er nógv tann størsti parturin. Termiska framleiðslan er fyri 2013 roknað at verða 153,1 GWt.

Framleiðslan frá teimum varandi orkukeldunum er mett at vaksa í 2013 frá 111,0 GWt í 2012 til 141,7 GWt í 2013, samstundis sum framleiðslan við termiskari orku er mett at falla við 26,1 GWt frá 179,2 GWt til 153,1 GWt. Hetta ger eisini, at oljunýtslan fellur við 5.613 tonsum.

Orsøkin er, at felagið tekur í nýtslu tríggjar nýggjar vindmyllur í Neshaga, eins og Eiði 2 suður verður liðugt útbygt og kann takast í framleiðslu. Vindmyllulundin í Suðurstreymoy fer í framleiðslu í 2013, og viðførir hetta, at framleiðsluparturin frá varandi orkukeldum fer at vaksa við 30,7 GWt frá 2012 til 2013.

### 3.3 Samlaðar inntøkur

Niðanfyri standandi talva vísir samansetingina í kundabólkinum hjá felagnum í prosentum og í mió. kr.

| Kundabólkur | Væntaður vøkstur í % í 2012 | Streym-søla 2012 | Fast-gjald | Ætlaður vøkstur í % í 2013 | Søla í mió.kr. fyri 2013 | Fast gjald |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Landbúnaður, aling, fiskivinna og ráevnisvinna | 6,0 | 28,5 | 1,0 | 2,0 | 32,1 | 1,0 |
| Gerð, framleiðsla og byggivirksemi | 17,5 | 56,2 | 1,6 | 2,0 | 62,8 | 1,6 |
| Handils-, matstovu- og gistihúsvirksemi | 2,0 | 30,7 | 0,8 | 1,0 | 32,2 | 0,8 |
| Flutningur, postur og fjarskifti | 2,2 | 39,7 | 0,6 | 1,0 | 42,8 | 0,6 |
| Fígging, trygging og aðrar vinnutænastur | 5,0 | 5,6 | 0,1 | 1,0 | 6,0 | 0,1 |
| Almennar og privatar tænastur kirkjur, samkomur v. m. | 0,5 | 49,6 | 1,4 | 1,0 | 52,0 | 1,4 |
| Gøtuljós | 0,0 | 9,8 | 0,3 | 0,0 | 10,2 | 0,3 |
| Sethús, íbúðir, summarhús og neyst | 1,7 | 118,5 | 10,3 | 2,0 | 125,0 | 10,3 |
| Íalt | - | 338,8 | 16,2 | - | 363,1 | 16,2 |

Sum omanfyri standandi talva vísir, verður roknað við eini øking í inntøkunum hjá felagnum í 2013. Talan er um eina øking í søluni av kWt, eins og prísurin verður hækkaður við 0,05 kr. pr. kWt fyri allar kundabólkar tó so, at prísurin í ídnaðarkundabólkinum hækkar við 0,11 kr. pr. kWt. Í 2013 og við 0,05 kr. pr. kWt í 2014. Roknað verður við eini øking í fleiri bólkum, sum framgongur av talvuni.

Við útgangsstøði í avroknaðari sølu í GWt fyri 2011 og eini framrokning av søluni í GWt fyri 2012 verður ætlaða sølan í 2013 271,3 GWt. Fasta gjaldið verður óbroytt. Herumframt koma so inntøkur av íbindingargjaldinum og annað upp á 3,0 mió. kr, soleiðis at roknað verður við eini samlaðari inntøku upp á 380,4 mió. kr. Hetta svarar til, at felagið fær eina meirinntøku upp á 23,60 mió. kr. í mun til framroknað fyri 2012. Orsøkin er hækkandi elprísurin og meirsølan av streymi.

## 4. Oljuútreiðslur

Felagið hevur havt sera stórar útreiðslur í sambandi við keyp av olju, og í ætlanini fyri 2012 varð roknað við eini oljuútreiðslu pr. tons tungolju[4] svarandi til 3.737 kr. Síðani er

[4] Íroknað smyrjuolju og gassolju.

kostnaðurin av oljuni øktur munandi, og í ætlanini fyri 2013 verður roknað við einum oljuprísi pr. tons tungolju svarandi til 4.390 kr. svarandi til ein meirkostnað pr. tons tungolju upp á 653 kr.

Tá ið felagið vanliga nýtir eitt stað millum 36 til 40 túsund tons tungolju árliga, er meirkostnaðurin av hesum, um roknað verður við 36 túsund tons tungolju 23,5 mió. kr. og við 40 túsund tons 26,1 mió.kr.

Framroknaðar oljuútreiðslur fyri 2012 verða mettar at verða 167,3 mió. kr., meðan oljuútreiðslurnar fyri 2013 verða ætlaðar til 144,5 mió. kr., sum er 22,8 mió. kr. lægri. Orsøkin er her fallandi oljunýtslan við 5.613 tonsum grundað á nýggju vindmyllurnar hjá felagnum í Neshaga og nýggja vindmyllulundin í Suðurstreymoy. Herumframt eitt minni fall í miðaloljuprísinum upp á 9,5 dollar pr. tons tungolju í mun til undanfarna ár.

Fyri 2013 er roknað við einum prísi upp á 4.390 kr. pr. tons tungolju og einum samlaðum tonsa-tali upp á 32.921 tons svarandi til eitt fall up á 5.613 tons í mun til 2012.

Fyri at áseta prísstøðið av oljukeypinum í rakstarætlanini fyri 2013, er støðið tikið í "forward kurvini fyri oljuprísin av tungolju" pr. 13. november 2012 fyri komandi 12 mánaðirnar í miðal. Herumframt er dollarkursurin ásettur til 6,0 krónur fyri hvønn dollar (600,00). 13. november 2012 var kursurin sambært Danska Nationalbankanum 5,8737 kr. fyri hvønn dollar (587,37).

Oljuútreiðslurnar svara til 37,7% av metta kostnaðinum, avskrivingunum og rentum fyri 2013. Tí fær tað stóra ávirkan á rakstrarúrslitið, um gongdin í oljuprísinum og kursinum á dollaranum verður munandi øðrvísi enn tað, ið mett er í rakstraræltlanini. Herumframt keypir felagið eisini olju til víðari sølu til triðjamann. Hetta talið er fyri 2013 mett at verða 30,1 mió. kr. Felagið hevur eina inntøku svarandi til 0,7 mió. kr. av hesi sølu. Henda inntøka skal rinda fyri útreiðslur, felagið hevur at umsita søluna.

Niðanfyri standandi talva vísir gongdina í oljuprísinum seinastu nógvu árini. Talvan vísir kostnaðin í US-dollar pr. tons tungolju.

Leiðsla felagsins hevur seinasta árið arbeitt við, hvørt SEV skal fara undir at hedga (prístryggja) olju. Sum eina roynd hevur felagið hedgað helvtina av oljukeypinum fyri seinra hálvár 2012, og við støði í hesi roynd skal støða takast til, hvørt SEV skal hedga alt oljukeyp ella partar harav fyri 2013.

Hedging strategi'in hjá SEV er vald út frá tí meting, at tað hevur týdning fyri felagið at klára at halda fíggjarætlanina fyri komandi ár. Endamálið við at hedga (prístryggja) oljukeypið ella partar harav, er at stovnsseta eina trygging fyri at minka um príssveiggið á framtíðar oljuprísinum í US-dollars í mun til ætlaða nýtslu/keypið av olju hjá felagnum.

SEV

Herumframt verður neyðugt at taka støðu til, um SEV eisini skal terminstryggja teir US-dollars, sum skulu nýtast til oljukeyp.

Endalig støða hertil verður tikin, tá ið úrslitið fyri royndina av hedgingini fyriliggur við endan av árinum.




Omanfyri standandi grafur vísir, at oljuprísurin hækkaði í 2008 til tað hægsta nakrantíð. Síðani fall oljuprísurin aftur fyrst í 2009 fyri síðani aftur at vaksa stórt sæð fram til dagin í dag. Oljuprísurin í dag er á einum sera høgum støði.

## 5. Orkukeyp og vindorkuframleiðsla

Roknað verður við, at felagið sambært avtalu við Sp/f Røkt í Vestmanna fer at keypa vindorkuframleidda elmegi upp á umleið 7,3 mió kWt fyri 0,40 kr. pr. kWt. Hetta gevur eina útreiðslu til orkukeyp upp á 2,9 mió. kr., sum er innroknað í fíggarætlanini fyri 2013. Hædd er tikin fyri hesum orkukeypi í framleiðsluni á Sundsverkinum og harvið sparingum í oljuútreiðslunum.

## 6. Útreiðslur

Rakstrarútreiðslurnar hjá felagnum verða vanliga býttar í lønir til starvsfólk, tilfar og tænastuveitingar. Hesir báðir bólkar verða aftur býttir millum netvirksemið, framleiðsluvirksemið og fyrisiting. Fyrisitingarútreiðslurnar hoyra sum útgangsstøðið til netvirksemið, men talan er í ávísan mun um felags útreiðslur, har ein partur eisini hoyrir til framleiðsluvirksemið.

### 6.1 Lønarútreiðslur

Niðanfyri talva vísir gongdina í samlaðu lønarútreiðslunum seinastu árini í mió. kr.

| 2007 Staðfest | 2008 Staðfest | 2009 Staðfest | 2010 Staðfest | 2011 Staðfest | 2012 Ætlan | 2012 Framroknað | 2013 Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 53.051 | 57.168 | 62.277 | 65.061 | 62.576 | 65.586 | 59.569 | 62.438 |

Roknað verður við eini samlaðari lønarútreiðslu upp á 62,4 mió. kr. í 2013 mótvegis 65,6 mió. kr. ætlað fyri 2012. Hetta er ein lækking upp á 3,2 mió. kr. Framroknað fyri 2012 verða lønarútreiðslurnar mettar til at verða 59,6 mió. kr., og í mun til ætlað er talan um eina lækking upp á 6,0 mió. kr.

Roknað er við øktum starvsfólkatali í 2013 innan ávís øki, eins og hædd er tikin fyri tí frágongd í starvsfólkatilfeingi, spariætlanin 2012 hevur viðført. Niðanfyri standandi talva vísir samlaðu lønarútreiðslurnar sundurgreinaðar á framleiðsluvirksemið, netvirksemið og fyrisiting seinastu árini.

| | 2007 Staðfest | 2008 Staðfest | 2009 Staðfest | 2010 Staðfest | 2011 Staðfest | 2012 Ætlan | 2012 Framroknað | 2013 Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Framleiðsla | 24.684 | 23.937 | 32.878 | 31.103 | 32.135 | 25.723 | 25.832 | 26.749 |
| Net | 16.507 | 18.615 | 19.326 | 23.915 | 20.420 | 28.160 | 23.547 | 25.144 |
| Fyrisiting | 11.860 | 14.616 | 10.073 | 10.043 | 10.021 | 11.703 | 10.189 | 10.044 |
| Íalt | 53.051 | 57.168 | 62.277 | 65.061 | 62.576 | 65.586 | 59.569 | 62.438 |

Omanfyri standandi talva vísir, at lønarútreiðslurnar hava verið vaksandi frá 2007 til og við 2010 fyri síðani at lækka nakað.

Lønarútreiðslurnar til framleiðsluvirksemið hava í 2009 til 2011 verið á einum hægri støði enn ætlað og framroknað fyri 2012 og 2013. Á framleiðslusíðini er roknað við øktum tilfeingi í sambandi við komandi útbygging á Sundi, eins og dentur skal leggjast á størri viðlíkahald av vatnorkuverkunum. Herumframt verður størri orka løgd í at reka útoyggjaverkini.

Lønarútreiðslurnar til netvirksemið hava verið vaksandi, og roknað er í 2013 við øktum tilfeingi á økinum fyri at kunna nøkta tørvinum fyri skilagóðum viðlíkahaldi og nýgerðum.

Lønarútreiðslurnar til fyrisitingina hava síðani 2009 verið umleið á sama støði. Ætlaði kostnaðurin fyri 2013 er á sama støði sum undanfarin ár, sjálvt um roknað er við øktum tilfeingi innan KT-økið.

Samanlagt hevur felagið lagt seg eftir so vítt gjørligt at tálma lønarkostnaðinum fyri 2013.

## 6.2 Tilfar og tænastuveitingar

Roknað er við einum samlaðum kostnaði upp á 72,0 mió. kr. í 2013 mótvegis framroknað 52,9 kr. í 2012 svarandi til eina hækking upp á 19,1 mió. kr. Vøksturin upp á tær 19,1 mió. kr. kann sundurgreinast soleiðis, at 4,6 mió. kr. er vøkstur innan framleiðsluvirksemið, 4,5 mió. kr. vøkstur innan netvirksemið og 10,0 mió. kr. vøkstur innan fyrisiting.

### 6.2.1 Framleiðsluvirksemið

Niðanfyri talva vísir gongdina í kostnaðinum fyri framleiðsluvirksemið seinastu árini í mió. kr.

| 2007 Staðfest | 2008 Staðfest | 2009 Staðfest | 2010 Staðfest | 2011 Staðfest | 2012 Ætlan | 2012 Framroknað | 2013 Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 55.610 | 68.290 | 40.495 | 46.416 | 58.674 | 32.035 | 28.990 | 33.610 |

Omanfyri standandi talva við kostnaðinum fyri framleiðsluvirksemið vísir, at ætlaði kostnaðurin fyri 2013 er á einum væl lægri støði enn undanfarnu árini. Kostnaðurin fyri 2013 er ætlaður at verða 33,6 mió. kr. mótvegis 32,0 mió. kr. ætlað í 2012, sum er eitt vet hægri enn undanfarna ár.

Framroknaðu útreiðslurnar fyri 2012 verða mettar til at gerast 28,9 mió. kr., svarandi til eina lækking í mun til ætlað fyri 2012 upp á 3,1 mió. kr. sum er á einum lágum støði í mun til undanfarin ár.

At ætlaði kostnaðurin fyri 2013 veksur 3,1 mió. kr. í mun til framroknað fyri 2012 skyldast, at neyðugt er at fremja ymiskt viðlíkahaldsarbeiði, sum ikki kann bíða longur. Talan er um eftirlit av turbinum, umhvørvismál, vanligt viðlíkahald á skipanir, motorar og bygningar eins

og útskifting av reléum v. m. Serliga á Sundsverkinum skal viðlíkahald gerast á ein av motorunum fyri umleið 4 mió. kr., eins og gjørt varð í 2012 fyri annan motor.

Í fíggjarætlanini fyri 2012 vórðu útreiðslurnar fyri 2013 til tilfar og tænastuveitingar fyri framleiðsluvirksemið ætlaðar at verða 47,6 mió. kr. Útreiðslurnar gjørdust tíbetur ikki so stórar, sum roknað varð við frá fyrstani tíð. Orsøkin er, at tørvurin í 2013 er mettur eftir nýtsluni í 2012, eins og arbeitt verður við fleiri møguleikum fyri rakstri og viðlíkahaldi innan framleiðsluvirksemið.

### 6.2.2 Netvirksemið

Niðanfyri talva vísir gongdina í kostnaðinum fyri netvirksemið seinastu árini í mió. kr.

| 2007 Staðfest | 2008 Staðfest | 2009 Staðfest | 2010 Staðfest | 2011 Staðfest | 2012 Ætlan | 2012 Framroknað | 2013 Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 33.223 | 40.502 | 16.577 | 18.471 | 15.099 | 13.303 | 12.113 | 16.599 |

Omanfyristandandi talva við kostnaðinum fyri netvirksemið vísir, at hesin fyrstu árini hevur verið á einum munandi hægri støði enn ætlað fyri 2012 og 2013.

Útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar til netvirksemið eru mettar til 16,6 mió. kr. í 2013 mótvegis 13,3 mió. kr. ætlað í 2012. Vøksturin er 3,3 mió. kr. Framroknaði kostnaðurin fyri 2012 verður mettur at verða 12,1 mió. kr.

At kostnaðurin veksur í 2013 í mun til ætlað fyri 2012 stendst av, at neyðugt er við viðlíkahaldi og ábøtum á øllum netinum eftir ódnarveðrið veturin 2011/2012. Hertil kemur neyðugar um- og útbyggingar. Ódnarveðrið hevur eisini víst SEV á, at enn er neyðugt at gera ábøtur og broytingar á 60 KV skipanina. Kostnaðurin av hesum kann tí ávirka rakstur og íløgur komandi árini.

Í fíggjarætlanini fyri 2012 vórðu útreiðslurnar fyri 2013 ætlaðar at verða 13,3 mió. kr., men hendan meting helt ikki grundað á tørvin av viðlíkahaldi, ábøtur og nýgerð á netið millum annað eftir harða veturin.

### 6.2.3 Fyrisiting

Niðanfyri talva vísir gongdina í kostnaðinum fyri fyrisiting seinastu árini í mió. kr.

| 2007 Staðfest | 2008 Staðfest | 2009 Staðfest | 2010 Staðfest | 2011 Staðfest | 2012 Ætlan | 2012 Framroknað | 2013 Ætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12.380 | 15.748 | 12.685 | 15.036 | 16.516 | 15.516 | 11.787 | 21.796 |

Omanfyristandandi talva við kostnaðinum fyri fyrisiting vísir, at kostnaðurin íroknað kanning og ráðgeving og tap upp á skuldarar v.m. hevur ligið millum 12,4 mió. kr. og upp í 16,5 mió. kr. At kostnaðurin fyri fyrisitingina í 2011 gjørdist 16,5 mió. kr. skyldast útreiðsluføring av fyrireikingarkostnaðinum fyri Víkarvatnsverkætlanina og ætlaðu útbyggingina av skrivstovubygninginum við Landavegin upp á ávikavíst 4,2 mió. kr. og 1,0 mió. kr. Harumframt varð avsett kostnaður til trætumál við 1 mió. kr. Verður hesin kostnaður drigin frá, verða útreiðslurnar í 2011 til tilfar og tænastuveitingar 10,3 mió.kr., sum er lágt í mun til undanfarin ár.

At framroknaði kostnaðurin fyri 2012 verður mettur til 11,8 mió. kr. stendst av at útreiðslur til benchmarking kanning av SEV, viðlíkahald av fyrisitingarbygninginum á Landavegnum, øktum kostnaði til tryggingar, spariátak 2012 og annar kostnaður.

Útreiðslurnar fyri 2013 verða ætlaðar til 21,8 mió. kr., sum er ein munandi øking í mun til ætlað 2012 svarandi til 6,3 mió. kr. Í mun til framroknað 2012 er talan um ein vøkstur upp á 10,0 mió. kr. Ætlað er við áleið sama kostnaði í teimum ymisku útreiðslupostunum sum undanfarin ár, men vøksturin í útreiðslunum stendst av vøkstri í einstøku rakstrarpostunum sum nevnt niðanfyri.

Hesir eru vøkstur í viðlíkahaldi av fyrisitingarbygninginum upp á 2,0 mió. kr., bankakostnaður upp á 3,8 mió. kr. í sambandi við íløguætlanina sum stendur fyri framman, kostnaður til menning av leiðarum 0,8 mió. kr. og arbeiðið við Heildarætlanini fyri elveitingarøkið í Føroyum 2,0 mió. kr. ella íalt 8,6 mió. kr.

Meirkostnaðurin til viðlíkahald av fyrisitingarbygninginum, kostnaður til heildarætlanina og bankakostnaðurin í sambandi við íløguætlanina eru kostnaðir, sum ikki í sama mun ganga aftur ár undan ár. Um hædd verður tikin fyri hesum kostnaðum, er talan um, at fyrisitingarkostnaðurin verður ætlaður til 14,2 mió. kr., sum er eitt vet hægri enn framroknað 2012, men nakað lægri enn undanfarin ár.

## 7. Avskrivingar

Avskrivingar eru mettar til 73,7 mió. kr. fyri 2013 við støði í verandi ognum, til- og frágongd av ognum. Hetta er ein øking upp á 12,3 mió. kr. í mun til framroknað fyri 2012. Orsøkin er

vaksandi íløgur, sum felagið ger. Býtið av avskrivingunum millum árini kann broytast nakað, alt eftir nær ognirnar verða tiknar í nýtslu. Hetta verður javnað millum tilgongd og arbeiði í gerð.

Avskrivingarnar í ætlanini fyri 2013 og fram taka støði í teimum kravdu avskrivingaráramálunum, ásettar av Elveitingareftirlitinum. Í ætlanini verða framleiðsluognir í miðal avskrivaðar yvir 35 ár og bygningar í 50 ár. Íløgur í netvirksemið verður í miðal avskrivað yvir 35 ár, eins og íløgur í rakstrargøgn verða avskrivaðar í miðal yvir 5 ár.

## 8. Íløgur

Roknað verður við íløgum fyri 280,0 mió.kr. í 2013. Hesar verða býttar soleiðis:

| **Íløgur** | 2013 | | 2012 | |
|---|---|---|---|---|
| | Mió.kr. | prosent | Mió.kr. | prosent |
| Fossáverkið | 7,8 | 2,8 | 1,6 | 0,9 |
| Heygarverkið | 10,6 | 3,8 | 10,3 | 5,7 |
| Mýruverkið | 0,9 | 0,3 | 0,3 | 0,2 |
| Eiðisverkið | 26,8 | 9,6 | 57,1 | 31,7 |
| Verkið í Botni | 0,0 | 0,0 | 0,1 | 0,1 |
| Vágsverkið | 2,2 | 0,8 | 0,8 | 0,4 |
| Verkið í Trongisvági | 0,6 | 0,2 | 3,3 | 1,8 |
| Sundsverkið | 31,8 | 11,4 | 24,0 | 13,3 |
| Strond | 3,2 | 1,1 | 0,0 | 0,0 |
| Smærri verk | 2,0 | 0,7 | 1,2 | 0,7 |
| Vindmyllur v.m. | 108,4 | 38,7 | 33,0 | 18,3 |
| **Framleiðsluvirksemið íløgur íalt** | **194,2** | **69,4** | **131,7** | **73,2** |
| Net, koblingsstøðir, bygningar v.m. | 68,7 | 24,5 | 33,0 | 18,3 |
| Amboð, akfør, KT-útgerð og fjaravlestur | 17,2 | 6,1 | 15,3 | 8,5 |
| **Netvirksemið íløgur íalt** | **85,8** | **30,6** | **48,3** | **26,8** |
| **Íløgur íalt** | **280,0** | **100,0** | **180,0** | **100,0** |

Eiðisverkið við tilhoyrandi tunlum verður væntandi liðugt fyrsta ársfjórðing 2014. Ætlandi skuldi arbeiðið verða liðugt mitt í 2013, men avbjóðingar hava verið við boringini av tunlinum, tí trupult hevur verið at borað ígjøgnum grótið, og harvið er arbeiðið seinkað munandi.

Arbeiðið er mett at kosta í alt 250 mió. kr., sundurgreinað á tunlar og inntøk fyri 190 mió. kr. og turbina 3 á Eiði v.m. fyri 60 mió. kr. Nýggja turbinan á Eiðisverkinum bleiv tikin í nýtslu fyrr í summar, og í løtuni fer fram arbeiði við dagføring av turbinu 1 og 2. Hetta arbeiðið verður væntandi liðugt um ársskiftið.

Íløgan í Eiðisverkið fyri 2013 upp á tær 26,8 mió. kr. kunnu sundurgreinast í 22 mió. kr. til tunlar og inntøk, 3,5 mió. kr. til vatnrør og 1,3 mió. kr. til aðrar smáíløgur.

Nýggj ventilatión skal keypast til Fossáverkið fyri 4,5 mió. kr., eins og nýggjur turbinuregulator skal keypast fyri 1,5 mió. kr., og neyðsstreymsanlegg setast upp fyri 0,5 mió. kr. Herumframt skulu aðrar smáíløgur gerast fyri 1,3 mió. kr. Íløgan í Fossáverkið er ætlað til íalt 7,8 mió. kr.

Íløgan í Heygarverkið bleiv útsett frá 2012 til 2013. Íløgurnar snúgva seg um kontrollanlegg fyri 7,5 mió. kr., bygning til maskintransformara og háspenningsanlegg fyri 3 mió. kr. umframt aðrar smærri íløgur fyri 0,1 mió. kr. ella íalt 10,6 mió. kr.

Smáíløgur upp á íalt 3,7 mió. kr. skulu gerast upp á Mýruverkið, Vágsverkið og verkið í Trongisvági, har serliga íløgan í eina spillivatnsskipan upp á 1 mió. kr. til Vágsverkið er tann størsta.

Fleiri ætlaðar íløgur í Sundsverkið 2012 eru útsettar til 2013. Íløgur í Sundsverkið eru serliga til at lúka umhvørvis- og trygdarkrøv frá myndugleikum. Serliga er talan um at dagføra verandi tangagarð fyri 23 mió. kr. Eisini verður farið undir at fyrireika ætlaðu íløguna í nýtt Sundsverk, sum skal leggjast fram fyri eigararnar, tá ið projektið er búgvið at taka støðu til. Avsettar eru 5 mió. kr. til fyrireikandi arbeiði. Herumframt verður ætlað við ymiskum smærri íløgum upp á íalt 3,8 mió. kr., soleiðis at íløgur verða gjørdar fyri íalt 31,8 mió. kr. í Sundsverkið.

Íløgur fyri 3,2 mió. kr. verða gjørdar í verkið við Strond, har serliga rørleiðingin í Svartadali stendur fyri 2,0 mió. kr. og aðrar smærri íløgur fyri 1,2 mió. kr. Smáverk á útoyggjum verða dagførd fyri íalt 2,0 mió. kr.

Felagið roknar við at gera íløgur í vindmegi komandi tvey árini fyri umleið 150 mió. kr., harav 108,4 mió. kr. verða gjørdar í 2013. Talan er um íløgur í eina vindmyllulund í Suðurstreymoy, sum felagið hevur arbeitt við seinasta árið. Í fíggjarætlanini fyri 2013 er vindmyllulundin innroknað. Roknað er við, at vindmyllulundin kemur í framleiðslu um miðjan 2013 við niðursettari framleiðslu.

Stórar íløgur innan net, koblingsstøðir, bygningar og annað skulu gerast í 2013. Serliga er talan um at styrkja netið og gera tað klárt til meiri vindorku og nýtt Sundsverk, sum neyðugt er at byggja. Koblingsstøðin í Vestmanna sum ætlandi skal byggjast, er útsett frá 2012 til 2014.

Ætlað er við íløgum í netið fyri íalt 48,2 mió. kr. umframt koblingsstøðum og bygningum fyri 20,5 mió. kr. ella íalt 68,7 mió. kr. Í sambandi við útbygging av netinum viðvíkjandi vindi, nýggjum Sundsverki og útbyggingum av Vágsverkinum er ætlað við 23 mió. kr. til endamálið, eins og 15 mió. kr. eru avsettar til útbygging av netinum sum heild, so sum 10 kV og 20 kV kaðalar og transformarastøðir kring landið. Herumframt er ætlað við einum 60 kV kaðali í Norðoyggjum fyri 5,0 mió. kr. eins og "kompenserast" skal á netinum fyri 2,0 mió. kr. Nýggjur 5 MW kaðal skal eisini leggjast í Vági.

Ætlað er við 20,5 mió. kr. í íløgum til koblingsstøðir og bygningar. Harav 6,5 mió. kr. til íløgur í skrivsstovubygningin við Landavegin í Tórshavn og 3,0 mió. kr. til útskifting av reléum í koblingsstøðina í Havnardali. Innrættingar verða gjørdar í núverandi høli í Vági fyri 3,0 mió. kr., eins og 3,0 mió. kr. verða avsettar til betran av hølisviðurskiftunum norðuri á Strond í Klaksvík. Aðrar 5,0 mió. kr. verða avsettar til betran av hølisviðurskiftum hjá netvirkseminum fyri at kunna reka virksemið meiri skynsamt. 17,2 mió. kr. eru íalt ætlaðar til amboð, akfør, KT-útgerð, skráir og fjaravlestur v.m.

Íløgurnar fyri 2014 eru mettar til 285,5 mió. kr., og fyri 2015 eru íløgurnar mettar til 329,5 mió. kr. Tó skal fyrivarni takast fyri kostnaðarmetingum av teimum ymisku projektunum, sum skulu gjøgnumgangast nærri.

## 9. Rentur og avdráttir umframt lántøka

Rentuútreiðslur og avdráttir eru mett út frá galdandi lániavtalum og ætlaðum nýggjum lánum. Framroknað fyri 2012 er ein nettorentuútreiðsla upp á 20,2 mió. kr., meðan roknað er við eini nettorentuútreiðslu upp á 27,6 mió. kr. í 2013 svarandi til eina øking av útreiðslunum upp á 7,4 mió.kr. Øktu rentuútreiðslurnar stava frá øktari lántøku, sum felagið hevur tikið, grundað á gjørdar og ætlaðar íløgur fyri 702 mió. kr. frá 2008 til 2013 og hall á rakstrinum í 2008, 2010, 2011 og 2012 fyri íalt 133,5 mió. kr.

Í 2008 vóru rentuútreiðslurnar 3,5 mió. kr. mótvegis eini langfreistaðari skuld upp á 105,8 mió. kr. við árslok sama ár. Við árslok 2012 verður langfreistaða skuldin framroknað til 453,6 mió. kr.

Í 2013 er ætlað við eini lántøku upp á 175 mió. kr. Skuldin við árslok 2013 verður tí ætlað til 608,0 mió. kr. svarandi til eina nettoøking í skuldini frá 2012 til 2013 upp á 154,4 mió. kr. Avdráttirnir eru mettir at verða 20,6 mió. kr í 2013.

Rentuinntøkurnar frá gjaldførinum eru mettar til at verða 0,2 mió. kr. í 2013. Lánini, sum roknað er við fyri fíggingina av langtíðaríløgunum, hava eina afturgjaldstíð sum er 20 ár, har lánið er avdráttarfrítt tað árið, sum lántøkan er framd. Verandi fígging hjá felagnum hevur ætlað eina afturgjaldstíð upp á 14 til 17 ár.

Hvørt felagið er ført fyri at halda fíggjarkostnaðinum á einum so lágum støði sum gjørligt, er treytað av rakstrarúrslitinum hjá felagnum frameftir.

## 10. Gjaldførið

Niðanfyri standandi talva vísir í høvuðsheitum gjaldførið úr sundurgreinaða gjaldførisyvirlitinum hjá felagnum. Tølini eru í t.kr.

| | Ætlan fyri 2012 | Staðfest og ætlað 2012 | Ætlan 2013 |
|---|---|---|---|
| Gjaldføriískoyti frá vanligum rakstri | 51.972 | 56.879 | 73.798 |
| Broyting, skuldarar, ognarar og goymslur | 0 | -44.884 | 0 |
| Gjaldførisískoyti frá rakstri | **51.972** | **11.995** | **73.798** |
| Íløgur og arbeiði ígerð | -179.950 | 130.493 | 280.049 |
| Lántøkur | 99.000 | 174.000 | 175.000 |
| | **-28.978** | **55.502** | **-31.251** |
| Goldnir avdráttir | 20.693 | 19.361 | 20.611 |
| | **-49.671** | **36.141** | **-51.862** |
| Ágóði við ársbyrjan | 85.725 | 56.887 | 93.027 |
| **Gjaldførið við ársenda** | **36.053**[3] | **93.027** | **41.165** |

Miðað verður eftir altíð at hava eitt gott og trygt gjaldføri. Ætlað er við eini trygdarmargu upp á 40 til 60 mió. kr. í tøkum peningi umframt ein nøktandi trekningsrætt í peningastovni. Í løtuni hevur felagið ein kassakreditt upp á 30 mió. kr. tøkan. Sum talvan vísir, hevur felagið tøkan pening upp á 41,2 mió. kr. við árslok 2013, umframt at ætlað er við einum kassakreditti upp á 30 mió. kr.

Neyðugt er hjá felagnum at hava gott gjaldføri kring ársskiftið, tí felagið móttekur ikki stórvegis pening frá kundunum í desember og januar mánað hvørt ár, tí hesir mánaðir eru sum heild gjaldsfríir. Ikki fyrr enn miðjan februar fær felagið inngjaldingar aftur. Hinvegin skal felagið rinda fyri íverksettar íløgur og rakstur í sama tíðarskeiði. Serliga er talan um stórar upphæddir til keyp av olju.

Tórshavn, 26. november 2012

Elfelagið SEV

[3] Áðrenn sparingar og inntøkur frá spariætlanini 2012

**Rakstrartøl og talvur síðu 28-42**